Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 03.11.2023
Mál nr.: 23/20795
Málsviðgjørt: JS

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 136 frá 19. desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir verða gjørdar hesar broytingar:
Fiskimannafrádráttur **§ 3.** Kommunurnar fáa árligt endurgjald frá landskassanum samsvarandi 19,1 prosent av frádráttinum annað árið fyri sbrt. § 33, nr. 17 í skattalógini í skattskyldugari inntøku sbrt. § 25 a í skattalógini.	**1.** Í § 3 verður sum stk. 2 sett: "*Stk. 2.* Í 2024 er endurgjaldið samvarandi 16,3 prosent av frádráttinum, í 2025 er endurgjaldið samsvarandi 12,2 prosent, í 2026 er endurgjaldið samsvarandi 14,3 prosent og frá 2027 er endurgjaldið samsvarandi 19,1 prosent."

Uttanlandsinntøka **§ 4.** Kommunurnar fáa árligt endurgjald frá landskassanum samsvarandi 19,1 prosent av frádráttinum annað árið fyri sbrt. § 33, nr. 12 og 13 í skattalógini í skattskyldugari inntøku sbrt. § 25 b í skattalógini.	**2.** Í § 4 verður sum stk. 2 sett: "*Stk. 2.* Í 2024 er endurgjaldið samsvarandi 15,3 prosent av frádráttinum, í 2025 er endurgjaldið samsvarandi 11,5 prosent, í 2026 er endurgjaldið samsvarandi 9,6 prosent, í 2027 er endurgjaldið samsvarandi 6,4 prosent. Í 2028 og fylgjandi ár verður endurgjald ikki goldið."